## Skógareldar og vatnflóð

Summarið roynist sera ymiskt á evropeiska meginlandinum. Í Portugal og Spania standa stór skógarøki í ljósum loga, samstundis sum áirnar í Miðevropa eru farnar langt upp um bakkarnar eftir glóprarregn.

Veðurmenninir í Portugal og Spania hava teir seinastu dagarnar ávarað um, at ein hitabylgja var á veg, og í gjár fór hitin nógvastaðni upp um 40 stig. Tað ger tað ikki lættari hjá sløkkiliðunum at basa skógareldunum, sum longu hava oyðilagt stór øki har norðuri í Portugal og í sponsku landspørtunum Valencia og Catalonia.

Tann nógvi hitin kemur úr Norðurafrika, og portugisiskir og spanskir læknar hava ávarað tey eldru ímóti hitanum. Fyri tveimum árum síðani doyðu fleiri túsund fólk í Spania, Portugal, Fraklandi og Italia av einari hitabulgju,.

Í Eysturríki, Sveits og har suðuri í Týsklandi hevur tað regnað so illa, at áirnar Donau, Inn, Isar og Salzach eru farnar langt upp um bakkarnar. Í Eysturríki hava myndugleikarnir ávarað um vatnflóð, og í býnum Mittersil stóðu fleiri gøtur undir í vatni í gjár.

## Einki um Norrønu

Tey, sum koma við bili til Bergen og skulu við ferjuni til Hirtshals, hava ongar trupulleikar við at finna, tí fleiri vegaskelti siga, hvønn veg tey skulu koyra fyri at koma oman til ferjuna.

Men skulu tey við ferju til Hanstholm, er støðan øðrvísi, tí har eru eingi vegaskelti, sum siga, hvussu tey so skulu koyra, skrivar Bergens Tidende, sum leggur afturat, at tað sama er galdandi, um fólk skulu til Lerwick ella til Føroya við Norrønu.

Á Fjord Line, sum hevur rutu til Hanstholm, eru tey sjálvandi misnøgd við tær vantandi upplýsingarnar. Ein talsmaður hjá vegamyndugleikunum sigur við Bergens Tidende, at myndugleikarnir hava lovað Fjord Line at seta fleiri skelti upp, men at pengar eru ikki tøkir til tess júst nú.

## Ger film um Mossad

Tann kendi merikanski filmleikstjórin Steven Spielberg er í ferð við at gera ein film, ið snýr seg um, hvussu ísraelska fregnartænastan Mossad beindi fyri fleiri palestinum, sum sambært ísraelsmonnum høvdu havt samband við álopið á tey ísraelsku ítróttarfólkini á teimum olympisku leikunum í Múnchen í 1972. Álopið kostaði ellivu ísraelsmonnum lívið.

Steven Spielberg er sjálvur jødi, men í Ísrael og aðrastaðni finnast fleiri at avgerð hansara at gera ein film um avrættingarnar hjá Mossad. Millum annað eru ísraelsmenn bangir fyri, at hann skal avdúka ymiskt, sum helst eigur at verða gloymt. Eitt nú myrdi Mossad ein ósekan norskan tænara, tí teir hildu hann vera ein av álopsmonnunum.

Tann nýggi filmurin hjá Spielberg hevur fingið heitið "Hevnd", og handritið byggir á bókina við sama navni, sum høvundurin George Jones gav út í 1984.

## Hørð revsing

Fyrrverandi stjórin í amerikonsku stórfyritøkuni WorldCom, Bernard Ebbers, hevur fingið 25 ára fongsul fyri sín lut í svikgøluni, sum bar í sær, at fyritøkan fór av knóranum.

Tað var dómarin Barbara Jones, sum feldi dómin fyrradagin. Frammanundan hevði Bernard Ebbers kravt, at rættarmálið skuldi ganga umaftur, men tað vildi dómarin ikki ganga við til. Hon legði afturat, at hevði tann ákærdi fingið linari revsing, enn hann fekk, hevði revsingin ikki staðið mát við hansara brotsverk.

Tann 15. mars bleiv tann 63 ára gamli Bernard Ebbers dømdur sekur í roknskaparsviki fyri tilsamans ellivu milliardir dollarar. Tað var Ebbers, sum stovnaði WorldCom, sum seinni gjørdist heimsins størsta telefyritøka, men svikið koyrdi fyritøkuna á heysin.

### UTTAN ÚR HEIMI

# Útsett í síðstu løtu

**Manningin á rúmdarferjuni Discovery var komin umborð, tá teknikararnir funnu eitt brek.**

RÚMDARFERÐ

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*



Hóast NASA hevur brúkt tvey ár til at bøta um trygdina umborð á Discovery, hava teknikararnir funnið trý brek seinastu tríggjar dagarnar.

Tey sjey rúmdarfólkini vóru komin at sita umborð á Discovery, tá teknikararnir á Cape Canaveral í Florida varnaðust, at ein brennievnimátari virkaði ikki, sum hann skuldi. Tí var einki annað at gera enn at biðja manningina fara útaftur og at útseta ferðina.

Leiðslan í NASA segði í gjár, at Discovery verður ikki skotin út í rúmdina fyrr enn í fyrsta lagi mánadagin. Men teknikararnir hava skund, tí eydnast tað ikki at fáa rúmdarferjuna avstað í seinasta lagi tann 31. juli, má ferðin útsetast til 9. september, tí tá kann ferjan aftur fáa samband við altjóða rúmdarstøðina.

Ferðin hjá Discovery er tann fyrsta, síðani ferjan Columbia sprongdist uppi yvir Texas tann 1. februar í 2003. Hesi tvey árini hava teknikararnir hjá NASA roynt at bøta allar hugsandi veikleikar, men kortini hava teir funnið trý brek umborð á Discovery hesa vikuna. Fyrst høvdu teir trupulleikar við einum lufttanga, síðani var skjøldurin á einum vindeyga í ólagi, og nú seinast virkaði tann eini brennievnimátarin ikki, sum hann skuldi.

Endamálið við ferðini hjá Discovery er í fyrsta lagi at royna trygdartiltøkini, sum eru sett í verk eftir vanlukkuna við Columbia, men ferjan skal eisini flyta ymsa útgerð upp til altjóða rúmdarstøðina.

Sjey fólk verða við Discovery, og ein kvinna er leiðari. Tað er Eileen Collins, sum eisini var úti í rúmdini í 1999.

# Oljupallur fekk slagsíðu

**Oljupallurin Thunder Horse hjá BP fekk stóra slagsíðu, tá ódnin Dennis herjaði í Meksikanska Flógvanum.**

ÓDN

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Enn er ikki greitt, hvussu tað kundi bera til, at tann stóri pallurin legði seg á liðina, og kanningar av skrokkinum hava ikki avdúkað nakran veikleika, sigur amerikanska sjóverjan.

Thunder Horse er tann størsti oljupallurin í Meksikanska Flógvanum. Hann var ikki byrjaður at taka olju upp, tá ódnarveðrið brast á, og nú liggur hann við so stórari slagsíðu, at ein partur av dekkinum liggur undir í sjógvi. Í gjár var ikki greitt, um tað ber til at rætta pallin uppaftur, men sum hava barlastpumpurnar ikki fingið skaða.

Eingin var á pallinum, tá óhappið hendi, tí BP, sum rekur pallin, hevði gjørt av at flyta fólkið av honum, áðrenn ódnarveðrið brast á. Seinni boðaði eitt skip frá, hvat var hent.

Tað er eisini ein stórur spurningur, um Thunder Horse fer undir framleiðslu í hesum árinum. Ætlanin var annars, at hann skuldi byrja seinni í ár, og at hann skuldi framleiða 240.000 tunnur av olju um dagin. Tað svarar til umleið ein sjeyndapart av allari oljuframleiðsluni í Meksikanska Flógvanum.

Óhappið kann eisini fáa fíggjarligar avleiðingar, tí sambært BP kostar Thunder Horse næstan sjey milliardir krónur.